

## Ólavsøka á Voss

Nú Norrøna ikki longur siglir til Bergens, er tað dýrt hjá føroyingum, sum búgva í Noregi, at fara til Havnar á ólavsøku. Tí er ætlanin at royna eitt alternativ. Ætlanin er, at føroyingar við familju savnast ólavsøkuaftan, týsdag 28. juli, á Voss folkehøgskule, har ólavsøk verður hildin og gist til dagin eftir. Døgurði 28. verður borðreiddur kl 15. Ólavsøkuguðstænastuna heldur Arild Hellesøy, próstur (sum er sonur Helgu úr Árnafirði) kl 18. Aftan á verður hugni á háskúlanum við náttúrða, grillmati, sangi og dansi. Heine Bugge hevur harmonikuna við. Ólavsøkudag 29. kunnu tey, sum hava hug, koma við eina útferð til barnaheimið hjá føroyavininum Per Sivle. Prísur: Gisting: 375 kr pr. pers. í dubultkamari; 100 kr eyka fyri einkultkamar. Morgunmatur 29. juli er íroknaður. Matur: Døgurði 28. juli: uml. kr 100. - Børnini gjalda sjálvandi minni fyri matin. TILMELDING (helst áðrenn 15. juli): Sendið teldupost til Edit.Bugge@lle.uib.no, ella skrivið ella ringið til Sniálv.

# Hildu ikki fráboðanarskyldu

**Báðir bilarnir gjørdust vrak, tá ein norðurgangandi bilur snaraði inn fyri ein annan bil, sum kom suðureftir**

POLITITÍÐINDI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ferðsluóhappið var mest skakandi hendingin í einum annars fyri løgregluna friðarligum vikuskifti.

Ein bilur á veg norðureftir skuldi snara inn á Hjalla, og varnaðist eftir øllum at døma ikki ein bil, sum var á veg suðureftir. Hann snaraði tískil inn fyri suðurgangandi bilin við eftirfylgjandi samanstoyti.

Bilarnir fórust so illa, at teir gjørdust báðir vrak, men mannskaði hendi tíbetur eingin.

Ferðsluóhappið hendi leygardagin um 15.45 tíðina.

Leygarnáttina blivu tveir mans ákærdir fyri brot á politiviðtøkurnar. Annar gekk í býnum í Havn og mól við einum bonki, meðan hin maðurin knústi eina fløsku niður í vegin beint framman fyri løgreglumonnunum.

Leygarkvøldið stjólu tveir ungir dreingir, 15 og 16 ára gamlir, ein skutara og eina tasku við nakað av pengum í. Eigarin av skutaranum fór saman við løgregluni at leita, og tað var skjótt, at skutarin varð funnin. Pengarnir vóru kortini burtur, og nú eru ungu dreingirnir skuldsettir fyri tjóvarí, brúksstuldur og herverk.

Annars hava nógv full fólk verið úti um vikuskiftið og fleiri hava sovið rúsin av sær á løgreglustøðini.

Sunnumorgunin vórðu eisini tvær kvinnur tiknar fyri at koyra við kenning, onnur 22 ára gomul og hin í 40-unum. Somuleiðis var eisini ein maður steðgaður fyri at koyra við kenning. Hann er 75 ára gamal.

### Brotið fráboðararskyldu

Brimil tóki partrolararnar, Fjalshamar og Nónhamar, sunnumorgunin klokkan 10.54. Parið hevði ikki hildið fráboðanarskylduna um beinleiðis veiði eftir upsa. Fiskiveiðieftirlitið upplýsir, at vanligi trolmeskurin er 145 millimetrar, men verður beinleiðis roynt eftir upsa, kann meskurin vera 135 millimetrar. Tað var í hesum sambandi, at trolararnir ikki høvdu hildið fráboðanarskylduna.

Skipararnir fingu fyrilagt eitt sektaruppskot upp á 50.000 krónur hvør, sum báðir góðtóku. Tað var tí ikki neyðugt at krevja skipini inn til lands, og parið kundi tí halda fram at fiska.




*Fjalshamar og Nónhamar vórðu tiknir fyri ikki at halda fráboðanarskylduna. Teir góðtóku sektaruppskotið og kundu tí halda fram við fiskiskapinum*





## Hús í Sørvági til sølu

Vælhildin stór hús í tveimum hæddum, ovara hæddin køkur (nýggjur), stova, nýtt baðirúm, hjúnarkamar v/wc og brúsu, og 1 sovikamar, stór gongd v/trappu til kjallara har eru 3 kømur, stova, vaskirúm/fýrúm og hjallur, + eitt rúm í er klárt til at gerða baðirúm í.

Garasja við grovkøki er bygd føst í húsið, uml. 40 fermetrar.

Garður er stoyptur rundanum og túni omanfyri er alt flisabelagt.

Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvið á blindvegi.

Búvídd er uml. 240 fermetrar. Grundøkið 750 fermetrar. Byggiár 1985

**Ringi og hoyri nærri á tlf. 210452 eftir kl 17.**

ÚTBJÓÐING

## Kelduskákið 4, Klaksvík

Við hesum verður arbeiðið viðv. umvæling av heimi fyri fólki við autismu í Klaksvík boðið út í almennari lisitatión sum høvuðsarbeiðstøka.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um um- og uppíbygging av verandi sethúsum til stovn. Húsini eru 500 m² til støddar í tveimum hæddum. Kjallarin er 255 m², og 1. hæddin er 245 m².

El- og HVS-arbeiðið verða boðin út fyri seg um nakrar vikur, og skulu tey bjóðandi innrokna stýring av hesum arbeiðum.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn hósdagin 6. august 2009 kl. 14.00.

Ástaðarfundur verður fríggjadagin 17. juli 2009 kl. 10.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast við at venda sær til Landsverk á teldupostadressu: hdl@lv.fo

Kontaktpersónur, telefonnummar og vinnutal skal upplýsast.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað við telduposti.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*


## Fólkatalið setur met

Fólkatalið veksur støðugt í Føroyum. Aftur er talan um met. Ongantíð áður hava so nógv fólk búð í Føroyum. Spennandi er um fólkatalið røkkur upp á 49.000 í summar. Verður flytingin til Føroyar á leið hin sama sum í juni og juli í fjør, tvs umleið 170 fólk, fer fólkatalið upp um 49.000. Verður flytingin til Føroyar hinvegin líknandi flytingini ið var í juni og juli árini 2005, 2006 og 2007, kemur fólkatalið neyvan upp á 49.000 fólk í ár, tí vanliga flyta fleiri fólk av landinum seinnu 5 mánaðirna av árinum, enn tað flyta til landið.

Talvan vísir nettoflytingina til Føroyar býtt á mánaðir januar 2005 - mai 2009. August og september eru stóru fráflytingarmánaðirnir, tá tey flestu við útbúgvingarørindum flyta av landinum.